

*Í einum stórum parti av íbúðunum á teimum ymisku Danland-miðdeplunum kanst tú sita í stovuni hjá tær og hyggja út á sjógv*



*Børnunum dáma altíð væl at sleppa at svimja. So at siga allir frítíðarmiðdeplarnir hjá Danland hava baðiland ella svimjihyl, har møguleikarnir eru góðir at stytta sær um stundir*

# Pakkaferðir vinna fram

**Ferðamynstrið hjá føroyingum hevur broytt seg nokk so fitt hesi seinnu árini. Serliga eru tað tær sonevndu pakkaloysnirnar, ið gerast alsamt betri umtóktar, sigur Hendrik Egholm, marknaðarstjóri hjá Smyril Line**

FERÐAVINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hesi seinnu árini hevur Smyril Line havt ein støðugan vøkstur í sølu av pakkaferðum, har familjur fara við bili við Norrønu. Serliga er tað til Danmarkar, at leiðin gongur, og í pakkanum, sum familjurnar hava keypt sær, er eisini uppihald á einum frítíðarmiðdepli ella einum summarhúsi. Tað er fyrst og fremst tann millum føroyingar so kenda Danland-ketan, ið fær vitjan av føroyskum familjum.

### Lætt at ferðast

Hendrik Egholm sigur, at tað er sera stórur áhugi fyri at fara til serliga frítíðarmiðdeplarnar, og hann ivast ikki í, at ein av orsøkunum til hetta er, at hesir miðdeplar hava nógv at bjóða børnunum.

– Teir allarflestu hava antin ein svimjihyl ella eitt heilt baðiland, og so er ein rúgva av øðrum tilboðum til børnini. Tað kann til dømis verða spælipláss, trampolin, hoppipúta, klatriborg, djór og mangt, mangt annað, sigur hann.

Somuleiðis heldur Hendrik Egholm, at fleiri og fleiri velja slíkar pakkaferðir, tí tað tá er so ómakaleyst at ferðast bæði aftur og fram.

– Tú pakkar tær bilin heima við hús í Føroyum, koyrir umborð á Norrønu, og tá ið tú kemur til Danmarkar, koyrir tú eini 2 tímar til frítíðarmiðdepilin, har tú pakkar út aftur. Tað er ómetaliga ómakaleyst, og tú sleppur undan øllum stríðnum, sum tú annars hevur, um tú ferðast á annan hátt. Danmark er samstundis eitt bíligt land fyri føroyingar, og mong keypa stórt inn tá tey eru á ferð. Tá er bilurin hentur at hava við, og hettar spælir eisini inn.

### Ferðast alt árið

Nakað annað, sum tey á Smyril Line hava lagt til merkis seinnu árini, er, at føroyingar í dag, í nógv størri mun enn fyrr, ferðast uttan fyri háárstíð. Serliga er tað um páskirnar og Tað hevur verið ein hópur av føroyingum á hesum miðdeplum um páskirnar í fleiri ár, greiðir Hendrik Egholm frá og leggur afturat, at tað væntandi eru lágu prísirnir sum gera, at so nógvar føroyskar familiur vejla at halda páskir í Danland. Hann vísir eisini á, at veðrið kann verða heilt gott í Danmark og hinum skandinavisku londunum á páskum. Í ár liggja páskirnar mitt í april, og tá er várið longu byrjað í Danmark.

Eitt annað, sum tey á Smyril Line hava lagt til merkis, er, at nógvar familjur venda aftur. Tað vil siga, at hesar familjur ár um ár fara á slíkar ferðir.

## FAKTA UM DANLAND

Danland er ein røða av frítíðarmiðdeplum í Danmark. Í løtuni er talan um 25 ymiskar miðdeplar, ið liggja spjaddir kring alt Danmark.
Sum vitjandi verður gist í antin eini íbúð í einum størri bygningi, ella gistir tú í einum sjálvstøðugum frítíðarhúsi á miðdeplinum. Hetta ger tað møguligt hjá teimum vitjandi at gera mat sjálvi, men miðdeplarnir hava í flestu førum eisini eina matstovu, har ymiskt fæst til keyps.
Á øllum Danland frítíðarmiðdeplum eru nógvir hentleikar, ið børn kunnu nýta til at stytta sær stundir við, og so at siga allir miðdeplarnir hava eisini antin egið baðiland ella svimjihyl.
Allir teir 25 frítíðarmiðdeplarnir hjá Danland liggja tætt við sjógv og strond.
Smyril Line selir familiupakkar til Danland um páskirnar úr kr. 6.570 fyri 2 vaksin, 2 børn, bil og eina viku í íbúð í Danland.
Meira fæst at vita um Danland á www.smyril-line.fo ella www.danland.dk

tn


# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin – í Sosialurin hvønn hósdag**

Fyrivarni ver›ur tiki› fyri villum



**SUZUKI IGNIS 1,5I 110 HK**
Árg 2005, Km 19.000. Sera kvikur. Kr. 129.000.



**SEAT CORDOBA DIESEL**
Árg 1999, Km 92.000. Kr. 55.000.



**CITROËN ZX**
Árg 1993, Km 109.000. Kr. 17.000.



**PEUGEOT 806**
Árg mai 2001, Prísur 135.0000.



**DAEWOO LEGANZA**
Árg 2002, Væl útgjørdur vi› t.d. le›ursetrum . Kr. 139.000.



**MAZDA E-2200**
Árg 2000, Km 120.000. prísur 65.000 v. mvg. N‡liga sproyta›ur og hevur øll eftirlit. .

**BMW 320I**
Árg 2002, Km 29.000. 6 syl. 2,2i vi› 170 hk. Er væl útgjørdur. Kr. 249.000.

**BILRØKT**
BILROKT.fo v/Jákup á Borg
Varðagøta 77 · FO-110 Tórshavn
tel: 58 88 80 · bilrokt@bilrokt.fo